# Gerðabók í sambandi við býráðsfund 1/2021

**Dagfesting:** 28.01.2021 kl. 19:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Edva Jacobsen, Magni Jøkladal, David Andreasen, Ólavur Larsen og Gudny Vang

Varalimir:

Ikki møtt:
Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 1/21 | 21/00056-4 | Bókasavnið - Roknskapur 2020 |
| 2/21 | 21/00060-1 | Skipan av øðrum nevndum og umboðum valskeiðið 2021-2024 - valstýrini fyri Hellurnar og Ferðslunevndin |
| 3/21 | 21/00061-2 | Dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu - januar 2021 |
| 4/21 | 21/00062-1 | Visjón og politikkir hjá Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024 |

1

**1/21**
**21/00056-4 Bókasavnið - Roknskapur 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 22.01.2021 | 3/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 1/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Mentamálanevndin | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Góðkenning av rokniskapinum hjá fólkabókasavninum fyri 2020, har útreiðslurnar vóru umleið 677 tús. kr., sum vórðu fíggjaðar av umleið 539 tús. kr. í kommunalum stuðli og umleið 136 tús. kr. í landskassastuðli og einum minni parti av innkrevjingargjøldum.<br><br>Sambært § 11 í bókasavnslógini – løgtingslóg um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005 – er tað mentamálanevndin hjá býráðnum, sum er bókasavnsnevndin, tá ein tílík ikki er sett á stovn.<br><br>§ 14 í somu bókasavnslóg ásetir, at landið rindar fólkabókasøvnum studning til rakstur av góðkendari fíggjarætlan, sum skal sendast landsmyndugleikanum til góðkenningar í seinasta lagi 15. mai árið fyri. Landskassastuðulin er í mesta lagi 40% av góðkendu fíggjarætlanini. Í løtuni er landskassastuðulin til bókasavnið í Fuglafirði umleið 18%.<br><br>Landsbókasavnið skal hava góðkenda roknskapin tilsendan í seinasta lagi 31. januar.<br><br>Sí viðfesta roknskap, sum mælt verður til at góðkenna, og viðkomandi skjøl í málinum. | | |
| Bakgrund | Freist pr. 31.01 at lata rokniskapin inn til Landsbókasavnið | | |
| Grundarlag | • Grundarlagið er Bókasavnslógin | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Mentanarleiðarin mælir til at góðkenna rokniskapin | | |
| Dagf | 22.01.2021 | | |

**Mentamálanevndin 22. januar 2021:**

Mentamálanevndin góðkennur rokniskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn 2020 og mælir býráðnum til at góðkenna rokniskapin. EáL fór av fundinum kl 14:30 og EJ tók yvir.

**Býráðið 28. januar 2021:**

Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá Mentamálanevndini, og góðkenna roknskapin hjá bókasavninum fyri 2020.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**2/21**
**21/00060-1 Skipan av øðrum nevndum og umboðum valskeiðið 2021-2024 - valstýrini fyri Hellurnar og Ferðslunevndin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing | Fuglafjarðar býráð varð skipað á fundi tann 3. desember 2020 fyri valskeiðið 2021-2024. Á hesum skipandi fundi vórðu borgarstjóri, varaborgarstjórar og fastar nevndir skipaðar, umframt flestu aðrar nevndir og umboð samsvarandi kommunustýrislógini kapittul 1-3, 6 og 7.<br><br>Á skipandi fundinum 3. desember í fjør tók nýggja býráðið avgerð um, at skipa onkra aðra nevnd á einum seinni fundi, eitt nú valstýrini til ávíkavist fólkatings-, løgtings- og kommunuval fyri Hellurnar valdømi og møguliga eina ferðslunevnd.<br><br>Tí verður málið lagt aftur á hesum býráðsfundinum. | | |
| Bakgrund | Skipan av Fuglafjarðar  býráð valskeiðið 2021-2024 | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 1-3, 6 og 7**<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at nevndu valstýri fyri Hellurnar valdømi verða skipaði og møguliga ein ferðslunevnd eisini. | | |
| Dagf | 23. januar 2021 | | |

4

**Býráðið 28. januar 2021**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at velja Elibert Kerá og Ernst Jacobsen í valstýrini viðvíkjandi kommunu-, løgtings- og fólkatingsval fyri Hellurnar valdømi. Býráðið umrøddi annars møguliga skipan av øðrum nevndum, eitt nú Kambsdalsnevndina og Ferðslunevndina.

## 3/21
## 21/00061-2 Dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu – januar 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 3/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing | Sambært § 5, stk. 1 í kommunustýrislógini skal kommunustýrið áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.<br><br>Fuglafjarðar kommuna hevur eina tílíka kommunustýrisskipan, sum varð góðkend á fyrsta sinni í 2001 og er síðani dagførd nakrar ferðir.<br><br>Í sambandi við skipan av Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024 tann 3. desember 2020 er neyðugt aftur at dagføra kommunustýrisskipanina, eitt nú tí at ein nýggj Orku- og umhvørvisnevnd er skipað.<br><br>Uppskot til dagføring av kommunustýrisskipanini er gjørt og er lagt við málinum til 1 viðgerð. Dagføringarnar fevna breitt í kommunustýrisskipanini. |
| Bakgrund | Skipan av Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin og tilhoyrandi kunngerð**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl **Uppskot til dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, dagfest 23. januar 2021** |
| Viðgerð | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nakað |
| Tilmæli | Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at býráðið við 1. viðgerð samtykkir uppskotið til dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu. | | |
| Dagf | 23. januar 2021 | | |

**Býráðið 28. januar 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) 1. viðgerð av dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, og ynskir at kommunustýrisskipanin verður viðgjørd nærri í føstu nevndunum og í umsitingini.

**4/21**

## 21/00062-1 Visjón og politikkir hjá Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 4/21 |



**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum |
| Stutt lýsing | Borgarstjórin ynskir at arbeiða við yvirskipaðum málum og politikkum á teimum ymisku økjunum fyri at menna Fuglafjarðar kommunu fram á leið. Í hesum sambandi hava borgarstjórin og kommunustjórin umrøtt visjóns- og politikkfyrireikandi arbeiði, sum borgarstjórin ynskir til umrøðu á býráðsfundinum<br><br>Viðlagt málinum eru uppskot til byrjanina til at orða ávíkavist starvsfólkapolitikk og bústaðarpolitikk, sum bygnaðarliga eru kjølfest í fíggjarnevndini, men har tað eigur at verða arbeitt tvørpolitiskt og fakligt um hesi bæði politikk-øki eins og onnur politikk-øki, eitt nú vinnu- og havna-, mentanar, sosial- og orku- og umhvørvispolitikk. |
| Bakgrund | Ynski hjá borgarstjóranum, at arbeiða við yvirskipaðum málum og ítøkiligum politikkum. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Kommunufulltrúin**<br>**Fíggjarætlanin**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Samanskriving av framløgum, sum kommunustjórin hevur hildið á starvsfólka- og leiðslubólkafundum, dagfest 23. januar 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Møguliga |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nakað |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at býráðið byrjar umrøðuna av yvirskipaðari visjón og politikkum innan tey ymisku økini hjá Fuglafjarðar kommunu | | |
| Dagf | 23. januar 2021 | | |

**<u>Býráðið 28. januar 2021:</u>**
Sambært tilmæli frá borgarstjóranum tók býráðið einmælt (9-0) undir við, at arbeiða víðari
við einari visjón fyri Fuglafjarðar kommunu og politikkum á teimum ymisku økjunum. 7
Býráðið ynskti í hesum sambandi, at føstu nevndirnar arbeiða ítøkiliga víðari við politikkum í
nevndunum soleiðis at politikkirnir við málum verða meira ítøkiligir fram ímóti sumri.

Fundurin lokin kl. 20:15

Gerðabókin lisin og góðkend

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

Eivin Breiðaskarð

Edva Jacobsen

Magni Jøkladal

David Andreasen

Ólavur Larsen

Gudny Vang



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo